HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingið**

30. august 2011
Mál: 11/00298-4
Tygara skriv:
Viðgjørt: JND

**Løgtingsmál nr. xx/2011: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið verða §§ 1 og 2 orðaðar soleiðis:

> **§ 1.** Sjúkrahúsverkið fevnir um Sjúkrahús Føroya umframt serligar stovnar eftir landsstýrismansins avgerð.
>
> **§ 2.** Við Sjúkrahús Føroya kunnu setast á stovn sergreinar eftir góðkenning frá landsstýrismanninum.
> *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um bygnað og fyrisitingarlig viðurskifti á Sjúkrahúsi Føroya.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**

Føroyska sjúkrahúsverkið hoyrir til tey minstu í heiminum. Kortini hava vit eitt vælútbygt sjúkrahúsverk, sum í høvuðsheitum virkar væl. Nakrar týðandi avbjóðingar eru tó. Hesar eru í høvuðsheitum trupulleikar við rekruttering av læknum, serliga serlæknum, støðugt økt spesialisering og harvið størri tørvur á serlæknum og endiliga øktur eftirspurningur eftir viðgerðum (fleiri viðgerðarmøguleikar, hækkandi miðallivialdur, fleiri kroniskar vælferðarsjúkur).

Avbjóðingarnar eru, sum so, tær somu, sum sjúkrahúsverkini í grannalondunum standa við. Ein munur er kortini, at føroyska sjúkrahúsverkið, orsakað av síni støðd, er rættiliga viðbrekið bæði tá umræður tilgongd og frágongd av starvsfólkum, herundir læknum og

serliga serlæknum, og tá ræður um møguleikarnar at tillaga til broyttar umstøður, tað verið seg fíggjarligar og heilsufakligar.

Yvirskipaða avbjóðingin er at fáa skipað sjúkrahúsverkið soleiðis, at borgaranum er tryggjað nøktandi viðgerð samstundis, sum kostnaðurin fyri viðgerðina verður so lágur sum gjørligt. Hetta merkir, at samlaða tilfeingið hjá sjúkrahúsverkinum skal gagnnýtast til fulnar. Endamálið er, at allir borgarar í landinum skulu fáa so góða heilsubót sum til ber við tí tilfeingi, ið vit hava í samlaða sjúkrahúsverkinum.

Ein fyritreyt fyri hesum er, at ræðisrætturin yvir samlaða tilfeinginum er savnaður á einum stað. Tí sjálvt undir bestu umstøðum, har full semja er ímillum javnsettar leiðarar um mál og miðlar, kostar samskiftið um og samskipan av tilfeingisnýtslu tíð og pening.

Tað er heilt náttúrligt at ein leiðari fyrst og fremst hevur eyga fyri at optimera sítt ræðisøkið og í besta føri gevur atlitum til størri heildir eina lægri raðfesting. Um umstøðurnar eru minni hepnar vil einstaki leiðarin, í stremban síni eftir at optimera sítt ræðisøkið, royna at flyta tilfeingi frá øðrum ræðisøkjum yvir til sítt egna. Hetta førir við sær eina støðu, har øll brúka tíð og orku uppá at vinna tilfeingi frá hvørjum øðrum. Úrslitið er, at eingin gerst ríkari, men at allir partar, í minsta lagi, brúka nógva tíð og orku uppá kappingina um tilfeingi; tíð og orku, sum kundi verið brúkt nógv betur til menning av ræðisøkinum og tænastu til borgaran. Í tí stóra høpinum er úrslitið av optimeringsstrembanini hjá einstaka leiðaranum sostatt væntandi optimering av heildini. Vit nevna hetta suboptimering.

Suboptimering er eyðvitað eitt vandamál í føroyska sjúkrahúsverkinum. Eitt vandamál, sum kostar tilfeingi og sum harvið gevur okkum eitt sjúkrahúsverk í verri standi enn tilfeingi er til sum heild. Ein munadygg samskipan av sjúkrahúsverkinum er tískil alneyðug.

Í galdandi sjúkrahúslóg er ásett, at sjúkrahúsverkið fevnir um trý sjúkrahús, og at hesi eru Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús. Samstundis er ásett, at landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta reglur um bygnað og fyrisitingarlig viðurskifti á hvørjum einstøkum sjúkrahúsi.

Í álitinum um framtíðar sjúkrahúsverk í Føroyum frá 2007 varð millum annað mælt til at skipa eitt heilsuverk undir einum stjóra. Í 2008 varð peningur settur av á fíggjarlógini, og søkt varð eftir einum heilsuverkstjóra. Men tá stjóri skuldi setast, var ikki politisk undirtøka fyri at seta eina leiðslu, ið skuldi virka omanfyri tær tríggjar sjúkrahúsleiðslurnar. Greiði politiski boðskapurin var, at málið skuldi ikki loysast við at skipa eitt leiðslulag afturat.

Í staðin fyri at seta eina felags leiðslu varð á vári 2009 gjørd ein samstarvsavtala millum teir 4 partarnar: Klaksvíkar sjúkrahús, Landssjúkrahúsið, Suðuroyar sjúkrahús og Heilsumálaráðið. Harumframt varð ein sjúkrahúsdeild skipað í Heilsumálaráðnum, við tí endamáli, at samskipa virksemið innan sjúkrahúsverkið betur, eisini umfatandi serviðgerð uttanlands. Endamálið við nevndu samstarvsavtalu var tað sama, ein betri samskipan og gagnnýtsla av tilfeinginum. Sum liður í samstarvsavtaluni varð ein menningarstjóri settur fyri øll trý sjúkrahúsini í eitt 2 ára skeið. Eisini varð eitt sjúkrahússtjóraráð skipað, mannað við stjórunum á teimum trimum sjúkrahúsunum og umboðum fyri leiðsluna í Heilsumálaráðnum. Uppgávurnar hjá sjúkrahússtjóraráðnum hava millum annað verið at fremja eina størri samskipan av sjúkrahúsverkinum og skipa fyri, at samstarvsavtalur verða gjørdar millum sjúkrahúsini í samsvari við sjúkrahúslógina. Harafturat varð ein strategiskur leiðslubólkur skipaður, har ovastu sjúkrahúsfakligu leiðararnir á teimum trimum sjúkrahúsunum vóru limir, umframt umboð fyri Heilsumálaráðið.

Eftir at henda skipan er roynd í tvey ár, kann staðfestast, at hon ikki hevur virkað nøktandi við atliti at betri samskipan av sjúkrahúsunum. Sjúkrahússtjóraráðið hevur havt regluligar fundir umleið annan hvønn mánað, og hevur hetta bøtt um tað samskipandi samskiftið. Strategiski leiðslubólkurin kom ongantíð rættuliga at virka og farið var tí burtur frá hesum fundarvirkseminum.

Sjúkrahúsini virka í dag sum tríggjar sjálvstøðugar eindir við hvør sínari sjúkrahúsleiðslu, har tað enn ikki er komið á mál við at gera nakra formliga samstarvsavtalu millum sjúkrahúsini. Royndirnar hava víst, at talan er um ein sera stirvnan leiðslubygnað, har tað er ógvuliga trupult at fáa virksemið samskipað upp á tvørs av sjúkrahúsum, við atliti at gagnnýta tilfeingið betur. Tað skal samráðast millum partarnar, og kann hvør einstakur velja at taka seg aftur, um so er at teirra áhugamál ikki verða gingin á møti. Heilsumálaráðið má sum yvirskipaður myndugleiki inn at taka avgerðir, har tað átti at verið loyst millum partarnar í sjúkrahúsverkinum.

Sostatt kunnu vit greitt staðfesta, at vit við verandi sjúkrahúsbygnaði, hvørki gagnnýta okkara heilsufakliga tilfeingi ella okkara fysiska og útbúnaðarliga tilfeingi nóg væl. Hetta merkist millum annað í ávísum førum við óneyðuga longum bíðitíðum hjá sjúklinginum.

Somuleiðis merkist hetta í fleiri førum við kostnaðarmiklum vaktløgum, har fíggjarliga tilfeingið ikki verður nýtt til gagns fyri sjúklingin og sjúklingatrygdina.

Mett verður, at tíðin er búgvin at stovna eitt nýtt Sjúkrahús Føroya burtur úr teimum trimum verandi sjúkrahúsunum undir einari felags leiðslu, sum verður skipað burturúr verandi leiðslutilfeingi í sjúkrahúsverkinum. Hetta merkir, at tað ikki skal setast ein leiðsla omaná verandi leiðslubygnað.

Ætlanin snýr seg um at niðurleggja øll okkara verandi sjúkrahús og í staðin stovnseta eitt nýtt sjúkrahús staðsett á trimum støðum. Talan verður ikki um at leggja tey bæði smærru sjúkrahúsini undir Landssjúkrahúsið, men heldur er talan um at fara burtur frá verandi bygnaði og skipa eitt nýtt Sjúkrahús Føroya. Heldur ikki verður talan um at máa støðið undan virkseminum í Klaksvík og í Suðuroynni. Tvørturímóti skal samlaða tilfeingið gagnnýtast enn betur enn í dag.

Ítøkiliga snýr leiðslubroytingin seg um, at í staðin fyri at tað nú eru 3 ymsir sjúkrahússtjórar, sum vísa til Heilsumálaráðið, verður tað í framtíðini bert stjórin fyri Sjúkrahús Føroya, sum fer at vísa til Heilsumálaráðið. Hetta ber í sær, at tann samskipan, sum í dag áliggur Heilsumálaráðnum at gera, í framtíðini fer at vera uppgávan hjá stjóranum fyri Sjúkrahús Føroya.

Endamálið við hesi leiðslubroyting er:

- at optimera samlaða virksemið í sjúkrahúsverkinum, sum millum annað fer at merkja, at virksemið økist og verður meira støðugt í øllum sjúkrahúsverkinum,
- at fáa sjúkrahúsverkið at virka sum eina eind við einari leiðslu, har tað verður tryggjað ein greið eintýðug leiðsluábyrgd fyri nýggja Sjúkrahús Føroya,
- at tilfeingið (fíggjarliga tilfeingið, starvsfólk, hølir og útbúnaður) verður gagnnýtt so rationelt sum gjørligt,
- at tryggja eina felags og miðvísa menningartilgongd og góðskutrygging fyri alt sjúkrahúsverkið,
- at tryggja eina greiða, tvørgangandi- og samanhangandi skipan í sjúkrahúsverkinum við atliti at sjúklingagongdum v.m.,

- at rætturin sum útbúgvingarstað fyri yngri læknar og kommunulæknar kemur at fevna um alt Sjúkrahús Føroya og ikki bert verandi Landssjúkrahús,
- at allir sjúklingar verða ávístir til sama sjúkrahús; nevniliga Sjúkrahús Føroya, sum síðani sendir sjúklingin víðari á rætta stað, alt eftir tørvi á viðgerð, gagnnýtslu av tilfeingi o.s.fr. Hetta fer at merkja styttri bíðirøðir fyri sjúklingin,
- at loysa Heilsumálaráðið frá samskipanini av sjúkrahúsrakstrinum soleiðis at ráðið í staðin kann nýta orkuna uppá yvirskipaða ætlanarlegging og heilsupolitiska raðfesting.

Ein týðandi avleiðing av nýskipanini verður, at játtanirnar til verandi trý sjúkrahús verða lagdar saman í eina játtan á løgtingsfíggjarlógini. Býtið av samlaðu játtanini millum ymisku eindirnar verður ein uppgáva hjá leiðsluni fyri Sjúkrahús Føroya, sum má loysast í mun til, hvussu leiðslan velur at skipa virksemið innan givnu karmarnar, við atliti til aðalendamálið við sjúkrahúsinum.

Hetta uppskotið skapar karmarnar um nýggja leiðslubygnaðin fyri Sjúkrahús Føroya. Við hesum uppskoti er ikki støða tikin til, hvussu hesir karmar ítøkiliga skulu útfyllast. Tað verður komandi stjórin fyri Sjúkrahús Føroya, sum, í tøttum samstarvi við allar viðkomandi partar, fær ábyrgdina fyri at útfylla karmarnar í samsvari við endamálið við hesari lóg. Í hesum liggur sjálvandi, at verandi fysisku og útbúnaðarligu karmar kring landið, framhaldandi skulu gagnnýtast, og at henda gagnnýtsla verður samskipað soleiðis, at sum mest fæst burturúr bæði viðgerðarliga og fíggjarliga.

**Ummæli:**
Tá talan er um broytingar viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum, eru náttúrliga nógvir partar, sum hava áhuga í og hugsanir um hesar, og sum vanliga verða bidnir um ummæli. Í sambandi við hesa lógarbroyting er avgerð kortini tikin um, at avmarkað hópin av ummælispørtum. Orsøkin er, at broytingin fyrst og fremst snýr seg um at savnað leiðsluheimildirnar, og broyta tilvísingarháttin í ovastu leiðsluni. Hetta ber, ikki í sær sjálvum við sær, nakrar ítøkiligar broytingar aðrastaðni í skipanini. Í tí víðari arbeiðinum, við bygnaðarmenning innan sjúkrahúsverkið, sum verður gjørt møguligt við hesari lógarbroyting, er eyðsæð, at nógvir aðrir partar eiga at vera hoyrdir.

Í samsvari við omanfyristandandi er uppskotið sent til ummælis hjá:

- Klaksvíkar sjúkrahúsi
- Landssjúkrahúsinum
- Suðuroyar sjúkrahúsi
- Landslæknanum
- Sjúklingaráðnum
- Bygnaðarbólkinum, sum løgmaður hevur sett.

## Kap 2. Avleiðingar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar
Broytingarnar hava ikki fíggjarligan meirkostnað við sær, men fara hinvegin ætlandi at hava við sær rationaliseringar í tann mun, at tilfeingið verður gagnnýtt betur, tá tað verður gjørligt at samskipa funktiónir.

Broytingin kann fara at hava við sær tænastumannakrøv í sambandi við, at tignin hjá leiðslupersónum kann verða lækkað, og harvið ein ávísan avmarkaðan kostnað, sum tó verður at fíggja innanfyri verandi játtan.

**Umsitingarligar avleiðingar**
Umsitingin av sjúkrahúsverkinum verður umskipað, við tað at fari verður frá trimum sjálvstøðugum sjúkrahúsleiðslum til eina. Nýskipaða umsitingin skal umsita sama økið, sum verandi tríggjar umsitingar gera í dag, og fer hetta sjálvsagt at hava við sær broyttar mannagongdir og málsgongdir.

Ein týðandi umsitingarlig avleiðing verður í Heilsumálaráðnum, við tað at samskifti ímillum ráðið og sjúkrahúsverkið verður umvegis ein stjóra ímóti trimum stjórum í dag. Harvið verður tann samskipandi leikluturin, sum Heilsumálaráðið í stóran mun hevur í dag, fluttur til stjóran fyri Sjúkrahús Føroya. Hetta fer at fríseta orku í ráðnum til í størri mun at arbeiða við yvirskipaðum heilsupolitikki og heilsupolitiskum raðfestingum.

**Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

**Umhvørvisligar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur, sum so, ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum. Tó kann roknast við, sum ein avleiðing av lógaruppskotinum, at virksemið hjá umsitingini á einstøku matriklunum, verður broytt í mun til í dag.

**Sosialar avleiðingar**
Uppskotið hevur ikki sosialar avleiðingar.

**Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

*Talva 2: Yvirlit yvir avleiðingar*

| | Fyri landið/ landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | (Ja) | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

## Kap. 3. Serligar viðmerkingar

***Til § 1:***
Broytingin ber í sær, at sjúkrahúsverkið ikki longur fevnir um trý sjúkrahús, men um eitt sjúkrahús: Sjúkrahús Føroya.

Til sjúkrahúsverkið kunnu eisini hoyra aðrir stovnar undir málsræði landsstýrismansins, sum við avgerð landsstýrismansins eru ella verða lagdir undir sjúkrahúsverkið. Hetta er ein broyting í mun til verandi lóg, har landsstýrismaðurin kann leggja stovnar undir sjúkrahúsverkið við kunngerð.

Við lógarbroytingini minkar talið á sjálvstøðugum sjúkrahúsmyndugleikum við beinleiðis tilvísing til Heilsumálaráðið úr trimum niður í ein. Hetta merkir, at samskipanin av sjúkrahúsverkinum í nógv størri mun enn nú kann avgreiðast uttan viðvirkan frá Heilsumálaráðnum.

***Til § 2:***
Skotið verður upp, at lógarbroytingin kemur í gildið 01. januar 2012. Hildið verður at tað er skilabest at formliga broytingin verður framd við byrjan av nýggjum fíggjarári.

Heilsumálaráðið, tann xx.xx.2011

**John Johannesen**

landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen